# Ósminkaður og ærligur boðskapur byggir brýr

**Tað eru í ár 20 ár síðani, at fyrsta útgávan við Frændum kom út og samstundis 20 ár síðani stórt friðartiltak júst á Vágsbø, har Frændur høvdu stóran leiklut. Nú verður arbeitt við tilfari til nýggja fløgu og okkurt av hesum verður at hoyra á Vágsbøi**



**Frændur:**
**Steintór Rasmussen, sang, Rani Nolsøe, guitar, sang, Eyðun Nolsøe, guitar, sang, Høgni Klakstein, trummur, Pætur við Keldu, keyboard, Agnar Lamhauge, bass**

»Saman við tær«" var heitið á útgávuni, sum Frændur góvu út í 1984 og tey 20 árini, ið liðin eru, hevur bólkurin verið saman við føroyingum í álvara og gaman. Manningin hevur megnað at syngja seg inn í føroysku hjørtuni, sum ongin annar. Sangir teirra eru fólkaogn og tað er óivað tað besta, ið orð- og tónasmiðir kunnu ynskja sær.

Summarfestivalur verður í Klaksvík í ár, men fyri júst 20 árum síðani, í 1984, var eisini stórt tiltak á Vágsbøi, har limirnir í Frændum áttu sín stóra leiklut. Ein friðarstevna var á hesum stað í 1984 og Frændur tóku lut. Ætlandi skuldi hetta verða afturvendandi tiltak, men so varð ikki, men nú - 20 ár seinni - sleppa Frændur aftur at royna seg á sama stað.

– Sjálv byrjanin var tó nakað fyrr, sigur Rani Nolsøe, sum tó ilskast á, at hann ikki havur sama fílaminnið, sum frændin Steintór.

– Eg meini tað var í desember í 1982 ella januar í 1983, at vit 3 í Frændum - Eyðun, Steintór og Rani - fóru á pall til eina konsert og saman við okkum vóru t.d. Hanus og Andras, og so varð farið í upptøkuhølini í 1984 og fyrsta útgávan kom út, minnist Rani.

## LIST LIVIR LEINGI

– Vit hava upplivað áhaldandi succes og nærum onga fiasko. Soleiðis er tað av onkrari orsøk. Og nú hava vit 20 ár á baki sum bólkur og tað skal markerast, sigur Rani Nolsøe.

Og Rani heldur sum so onki løgið vera í, at Frændur hava klárað at hildið sær í fremstu røð hesi ár og enntá eiga løg, sum eru klassikarar.

– Listin livir leingi. Mong dømi eru um tey, ið blíva eldri og betri, t.d. Eric Clapton, uttan samanburð annars. Hann er betri nú, enn nakrantíð. Og fólk eru ikki útbrend ella"ferdig", tá tey gerast 40, 50 ella 60 ár. Ein kann vera produktivur, tá ein kemur í lívsins heyst. Í okkara føri er tað so, at vit eru ikki broyttir so nógv og onki kolveltandi er hent í okkara lívum, sum so. Vit standa fyri tí sama og eru teir somu. Allir eru vorðnir familjumenn og so framvegis og allir hava verið t.d. føroyameistarar í talvi, leggur Rani skemtiliga afturat.

Ættarlið eftir ættarlið hava tikið Frændur til sín og hetta kennist væl og er ótrúligt, sigur Rani.

Orsøkina til góðu undirtøkuna øll árini torir Rani bert at gita, men hann hevur eitt boð.

– Tað er óivað so mangt, ið spælir inn. Men gott handverk, treiskni í upptøkuhølunum, vælskrivaðir tekstir og ósminkaður og ærligur boðskapur hevur nógv at siga, metir Rani, og hugsar um sangir sum t.d. Minnist tú gildið og Hundurin Brúni, ið hann metir hava tað við at fanga lurtaran, ein moralur er, men eisini hómast ein farri av skemti, humor, men tó er ikki talan um táttayrking.

– Eg giti, at vit hava havt hetta við at gera nógv burturúr innspælingini og verið ærligir og boðskapurin hevur verið ósminkaður, so fólk beinaveg hava kent seg aftur ella í hvussu er hava tey vitað hvar tey hava havt okkum. Men vert er at minnast, at ein góður sangur verður ikki til í upptøkuhølunum, tí er sangurin ikki væl skrivaður, so hjálpir øll heimsins tøkni einki, sigur Rani Nolsøe.

– Vit hava tó eisini verið hepnir. Fyrsta útgávan hevur mong av fólksligu løgunum. So kom Frændur 2 og har vóru fleiri hitt. Fólk undraðust so, hvørt vit kundu halda á. So kom útgávan 80'ini. Tøknin í hásæti og vit vóru hepnir at Óli Poulsen var har sum hann var júst tá, men aftur ein útgáva, ið riggaði og soleiðis haldi eg tað hevur verið. Vit hava havt nakað at givið, metir Rani Nolsøe.

## NEISTIN ER HAR

Teir tríggir í Frændum, Steintór, Rani og Eyðun, hava arbeitt við nýggjum tilfari, tí ætlanin er at geva eina fløgu út, nú bólkurin hevur 20 ár á baki og so stendur summarfestivalur í heimstaðnum eisini fyri framman, so teir hava funnið saman av og á til venjingar og væl hevur hepnast.

– Vit vóru saman í vár og gamli neistin var har. Annars kann sigast um nýggja tilfarið, at her verður tilfar frá okkum øllum, men enn er endaliga sáldanin ikki farin fram, sigur Rani Nolsøe, sum leggur afturat, at tað verður ein heiður at standa á sama palli á Summarfestivalinum, sum Ken Hensley, tí hann er ein, ið síggjast kann upp til, tí hann er frálíkur komponistur.

Tá Frændur fara á pall, so verður talan um sangir, ið hvørt mansbarn í Føroyum kennir, men eisini okkurt nýtt verður at hoyra og manningin gleðir seg, tí hetta er fyrsta framførsla í ár og so er eisini nakað síðani, at Frændur seinast stóðu á palli í Klaksvík.

## Edward gjørt búmerkið

Edward Fuglø hevur teknað búmerkið hjá Summar Festivalinum. Listamaðurin úr Klaksvík er víðagitin og virdur fyri sítt listarliga arbeiði, og hann hevur eisini fingið onkra virðisløn fyri tað.

Edward Fuglø hevur verið blandaður upp í mentanarlívið í Klaksvík gjøgnum eitt nú framsýningar og pallsetingar, og hann tók fegin uppgávuna á seg, tá ið hann varð biðin um at tekna búmerki til nýggja mentanartiltakið í Klaksvík.

Og fyrireikararnir av Summar Festivalinum eru sera fegnir um, at hann vildi teknað búmerkið. Tað verður mett sum ein heiður fyri festivalin.

Búmerkið er summarsligt við einari frískari skrift, sum Edward lutvíst sjálvur hevur teknað, og so er er summardái við Norðoyggjum eisini partur av búmerkinum.








